# Margfalda ferðalandið

**Ísland er kanska kent fyri víkingar, Geysir og Gullfoss. Men sum ferðamannaland hevur Ísland eisini so øgiliga nógv annað at bjóða**

**ÍSLAND**
**Jákup Mørk**
jakup@sosialurin.fo



Klintran upp eftir jøklunum er eitt av spennandi ítrivunum, sum eru á skránni í Íslandi

Íslendingar hava gjøgnum tey nógvu seinastu árini brandað landið sum oynna, har víkingasøgan aftur fær lív.

Fyri ferðamannin er víkingaøldin eisini sjónlig á flestu støðum, har vitjað verður, men í dag er tað fult so nógv stórslignar náttúruupplivingar, vælvera og ævintýr, sum eru søluvøran, tá ferðafólk eru á vitjan.

Heitu keldurnar geva hópatals møguleikar at bloyta seg í heilsugóðari vælveru. Sightseeings-ferðirnar bæði í og uttanfyri Reykjavík ganga títtar við fullsettum bussum, og mongu listarstøðini í býnum eru fyri tað nógva væl vitjað.

Seinnu árini er aktiva ferian tó eisini vorðin eitt mótaorð, og íslendingar vilja avgjørt ikki teljast millum eftirbátar í hesum.

Í dag telja sonevndu action-ferðirnar fult so nógv, tá ferðafólk vitja á Saga-oynni. Rafting, jøkulsferðir, kavin, ísklintran, holugonga, kano- og kajakróður, snorkling, golf, koyring í Super-Jeeps, hiking, sigling til stórhvalamið, koyring við All-Terrain-Vehicles, hestaútferðir og mangt annað stendur á skránni, sum gevur frítt val á mest sum øllum hillum. Ókeypis eru útferðirnar tó langt ífrá, men tær garantera ferðamanninum eina uppliving, sum er verd at minnast alt lívið.



Stóru víddirnar gera Ísland til eitt upplagt land til golf-ítróttina



Stóru dekkini á sonevndu super-jeepunum gera, at til ber at koyra til mest óatkomuligu støðini



River-rafting hoyrir heima millum meira ekstremu ítróttirnar, men vissa kann veitast fyri eini uppliving fyri lívið

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við teldupost
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakstí hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo



Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo